*Okkara kundi er ein størri handverkara fyritøka í Eysturoynni. Av tí at goymslumaðurin eftir 12 árum nú hevur fingið nýggjar avbjóðingar, er starv í fyritøkuni leyst at søkja sum:*

## Goymslumaður

Fyritøkan hevur eina stóra goymslu og stýring av vørunýtsluni, herundir neyv skráseting av vørum uppá projektir/arbeiðir, er ein týdningarmikil partur av uppgávuni hjá goymslumanninum. Persónurin sum vit leita eftir, skal kunna átaka sær fylgjandi:

***Uppgávur***:
⊥ Hava sjálvstøðuga ábyrgd av goymsluni
⊥ Halda goymsluna dagførda til eina og hvørja tíð.
⊥ Hava ábyrgd av at vørur til arbeiðir eru tøkar til tíðina
⊥ Víðka um sambandið við verandi veitarar og viðskiftafólk
⊥ Finna nýggjar veitarar og vørur
⊥ Marknaðarføra vørur og tænastur

Ongi krøv eru til ávísa útbúgving, men vit vænta av tær fylgjandi:

***Førleikakrøv***:
⊥ Hevur eina viðkomandi útbúgving.
⊥ Kanst arbeiða við fleiri tingum samstundis
⊥ Hevur hug at handla skjótt
⊥ Ert nærlagdur
⊥ Kann tosa og skriva enskt á handilsstøði, kunnleiki til onnur mál er ein fyrimunur
⊥ Hevur góð samstarvsevni og er fyrikomandi.

Lønin verður ásett eftir førleika, og í samráð við arbeiðsgevaran.

**Umsóknir:**
Er hetta eitt starv fyri teg, ert tú vælkomin til at senda eina umsókn til: Virkisráðgeving Spf, Boks 26, 600 Saltangará. Umsóknarfreist er: Fríggjadagin 28. juli 2000.

Um tú ynskir at vita meir um starvið kanst tú seta teg í samband við Virkisráðgeving Sp/f, tlf. 44 95 91 og tosa við Símun Hammer. Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Virkisráðgeving Spf
**Leiðsla - Búskapur - Marknaðarføring - Rekruttering - Góðskuskipanir**
Heimasíða: http://www.konsult.fo



## Skrivari/ málsviðgeri

**Endurlýsing**

**Til trivnaðarfyrisitingina, sosialu deild verður søkt eftir skrivara/málsviðgera at byrja skjótast tilber.**

**Høvuðsuppgávur**
Nakrar av høvuðsuppgávunum hjá másviðgeranum/skrivaranum hjá trivnaðarstjóranum og sosialdeildarleiðaranum eru:
- At skriva fundarskráir og fundarfrásagnir
- Fyrireika, geva boð og skipa fyri, tá fundir eru
- Edv-skráseta útgjaldingar eftir forsorgarlógini og barnaforsorgarlógini, sum kommunan skal hava endurgoldið
- Saman við skrivaranum hjá barnaverndarnevndini at hava eftirlit við og avstemma konti hjá sosialu deild
- Ymiskar málsviðgerðaruppgávur

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava skrivstovuútbúgving ella aðra relevanta útbúgving. Skal hava kunnleika til bókhald, tekstviðgerð og rokniark á brúkarastøði. Skal duga føroyskt til lítar.

**Persónligir eginleikar**
Umráðandi er, at viðkomandi dugir væl at leggja til rættis, er fyrikomandi, kann arbeiða sjálvstøðugt og dugir væl at samskifta, bæði innan- og uttanhýsis.

**Setunarviðurskifti**
Starvið verður lønt í 15. lønarflokki sambært sáttmálanum við Tórshavnar kommunala starvs- og tænastumannafelag.

**Kommunan bjóðar**
eitt áhugavert starv við fjølbroyttum og mennandi uppgávum.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Eyðun Jensen, sosialdeildarleiðara ella Gunnleyg Durhuus, trivnaðarstjóra, tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi íseinasta lagi 14. august 2000. Merk umsóknina "skrivari".

Tórshavnar kommuna

WWW.TORSHAVN.FO



## LUTASEÐIL



| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Toyota Corolla Hatchback (Frá Reyni Service) | virði | 169.400 kr. |
| 2. | Ferð fyri 2 vaksin og 2 børn við bili Tórshavn-Hanstholm við frítíðaruppihaldi í 1 viku í Danland (Frá Smyril Line) | virði | 15.000 kr. |
| 3. | Gávukort frá Th. Dam á Hálsi | virði | 10.000 kr. |
| 4. | Gávukort frá Shell | virði | 5.000 kr. |
| 5. | Gávukort frá Statoil | virði | 5.000 kr. |
| 6. | Gávukort frá Statoil | virði | 5.000 kr. |
| 7. | Gávukort frá Statoil | virði | 5.000 kr. |
| 8. | Gávukort frá Statoil | virði | 5.000 kr. |
| 9. | Apex ferðaseðil fyri 1 persón | virði | 2.800 kr. |
| 10. | Føroyskt krov | virði | 1.000 kr. |

Drigið verður bara millum seldar seðlar. Drigið verður mánamorgunin 7. august kl. 9.30 á Elektron og lýst í bløðunum 8. og 9. august 2000.
Eisini verða vinnaratølini løgd út á heimasíðu: www.sporthal.fo

Hestprent 314 555

STATOIL

Tórshavnar Ítróttarráð
2000 20 kr.



## Hjá okkum fáast vognar og útgerð til allar flutningsuppgávur!

- Viðfestisvognar sum lasta frá 325 kg. upp til 2.600 kg. –nógv model!'
- Eykalutir til viðfestisvognar
- Sekkjavognar, hydr. lyftiborð –arbeiðsbord
- Vognar til gassfløskur, oljutunnur, kassar, trappir –óteljandi møguleikar!
- Gafflar til heisan av plattum, vøru o.a.
- Tip - Ruskkonteinarir til trukkar
- Spennireimar og lyftistroppar
- Sleipikrókar til øll bilmerki!

Tosið við okkum!
Kaj Andreasen & Co
Sandvíkarhjalli - Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311820



**DANNY TRANSPORT**
- tá okkurt skal koyrast ella goymast
**Tlf. 319192**



**VEGG SAGING**
Hurðar,vindeygu, veggir, garðar o.a.

**HOL SAGING**
Frá Ø 24 mm. til Ø 450 mm.

**GÓLV FRESING**

**GÓLV SLÍPING**

**GÓLV SAGING**
Rennir, keiøki, asfalt, upptøka og burturbeining o.a.

**FØROYA BETONG SAGING** v/Hjaltur Tausen
Gerðisvegur • 620 Runavík • Tel. 447543 • Fax 448898

Sosialurin - 311820



**FLOGFRAKT/ SJÓFRAKT**
SAFARI TRANSPORT
GREIÐA ALLAN FLUTNING & ØLL PAPPÍR
Tlf. 32 22 22


www.sosialurin.fo



# Ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesi› eisini Ítróttasosialin á alnótini www.sosialurin.fo

# GÍ fer til Danmarkar á venjingarlegu

*GÍ skal spæla tríggjar venjingardystir í Danmark, og er hetta ein li›ur í fyrireikingunum til seinnu hálvu av landskappingini*

Stefan í Skorini

Vi› í fer›alagnum hjá GÍ, sum fór avsta› fríggjadagin vi› Norrønu, eru 21 spælarar og tríggir venjarar og eitt hjálparfólk. Eisini hava leikararnir fingi› loyvi til at taka konu og børn vi› sær, so tilsamans eru 54 fólk vi› í fer›alagnum hjá GÍ. Hetta ver›ur gjørt, av tí at leikararnir frammanundan eru nógv burtur í fótbóltsørindum.

Leikararnir búgva í Lemvig, har teir skulu leika tríggjar venjingardystir. Byrja› ver›ur longu mánadagin, tá i› GÍ skal møta Ikast. Mikukvøldi› er mótstø›uli›i› Holstebro, og fríggjakvøldi› skal GÍ spæla ímóti Lemvig. Allir dystirnir eru á grasi.

Á venjingarleguni skulu leikararnir venja tvær fer›ir um dagin, og tá i› dystur er, ver›ur bara vant einafer›. Leikararnir eru burtur í 10 dagar, og tilsamans ver›a 14 venjingar hesar dagarnar. GÍ leikararnir hava havt eina viku summarfrí, so nú ver›ur hildi› áfram til landskappingin er li›ug. Tá i› li›i› er afturkomi›, skulu teir spæla venjingardystir ímóti ø›rum føroyskum feløgum.



*Steypavinnararnir úr GÍ fóru í gjár til Danmarkar á venjingarlegu*

savnsmynd

# Fleiri ungdómsli› til Danmarkar

*Í næstu viku fara fleiri føroysk li› til Danmarkar at luttaka í fótbóltskappingum*

Stefan í Skorini

Seinastu árini hevur veri› vanligt hjá føroyskum li›um at luttaka í kappingum ni›ri í Danmark um summari›. Í ár er einki undantak, og seks føroysk li› fara til kappingina Limfjords Cup, sum byrjar í næstu viku. Kappingin er í Lemvig í Jyllandi, og í ár luttaka 115 li› úr Føroyum, Danmark, Noreg, T‡sklandi og Skotlandi. Li›ini fara sunnudagin og mánadagin til Danmarkar vi› flogfari úr Vágunum.

Havnali›i› B36 sendir heili f‡ra li› til kappingina, og vi› í teirra fer›alagi, sum fer avsta› sunnudagin, eru eini 70 fólk. B36 sendir tvey smádreingjali›, eitt piltali› og gentur 12-14. Gentuli›i› ver›ur stu›la› av Berghestum, sum veitir teimum troyggjur.

KÍ sendir eitt smádreingjali› til kappingina, og li›i› fer eisini avsta› sunnudagin. Vi› í fer›alagnum eru 21 fólk. Í innlei›andi bólkaspælinum skulu smádreingirnir hjá KÍ skulu spæla ímóti Hedensted, Hirtshals og ASV, sum eisini er úr Danmark. Hesir dystirnir ver›a spældir hósdagin og fríggjadagin, og finalurnar ver›a spældar leygardagin og sunnudagin. Fer›alagi› úr Klaksvík ver›ur aftur í Føroyum 26. juli.

Úr HB fara gentur 12-14 til Limfjords Cup. Tær fara avsta› mánadagin og ver›a burtur í átta dagar.

Eitt piltali› hjá HB fer eisini til Danmarkar í summar, men fari› ver›ur ikki avsta› fyrr enn beint eftir Ólavsøku. Piltarnir hjá HB skulu til Sjælland, har teir fara at spæla ímóti bestu piltali›unum hjá Brøndby, Herfølge, AB og Farum. Talan er um venjingardystir ímóti hesum li›unum, og fer›alagi› skal búgva í Farum. Eisini ver›ur høvi hjá piltunum at heilsa uppá Jákup Mikkelsen og Toda Jónsson, sum eru fulltí›ar yrkisleikarar.

Li›i› skal eisini luttaka í eini kapping, sum nevnist Hørsholm og Usserød Cup. Venjarar hjá piltunum eru Egil Jacobsen og Áki Davidsen, og fer›alagi› ver›ur burtur í frá 1. til 8. august.



*Gentur 12-14 hjá B36, sum sunnudagin fara til Danmarkar at luttaka í Limfjords Cup*

Mynd: Jens Kr. Vang